**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Heimarøktin*

# Heilsuhjálparar

## til Heimarøktina í Suðurstreymoy

Undir Heimarøktini og Serforsorgini við fyribils tænastu í Heimarøktini Suðurstreymoy sóknast vit eftir heilsuhjálparum.

Talan er um trý størv 25/40 í skiftisvaktum, bæði úti í Heimarøktini og inni á eldrasambýlunum sum hoyra til økið.

Heimarøktin veitir tænastu til heimabúgvandi brúkarar frá kl. 8.00 til 23.00. Eldrasambýlini virka sum døgnstovnar við náttarvakt.

Tænastan verður veitt í tøttum samstarvi við allar røktarfakbólkar, sum arbeiða í heimarøktini.

Umsøkjarar við heilsuhjálparaútbúgving og starvsroyndum hava fyrimun.

**Løn og setanartreytir:**
Lønar og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Heilsuhjálparafelag Føroya.
Meira fæst at vita um størvini frá Metu á Fløtum á telefon 317249.

**Umsókn:**
Umsóknir saman við prógvi, og arbeiðsváttan skulu vera økisleiðaranum í hendi seinast 17. mai 2006 kl. 12.00 og skulu stílast til:

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
att: Anna Maria Oskarsson, økisleiðari
Skálatrøð 14
FO-100 Tórshavn

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar til G4

Á **G4** verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingum til feriuavloysarastørv í juli og august 2006.

Deildin er ein kirurgisk seingjardeild við servitan innan ortopædi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum-, gynækologiskum-, eyga-, oyra-, nøs- og hálsasjúkum. Á deildini er pláss fyri 24 sjúklingum.

**Krøv til umsøkjararnar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga og royndir innan kirurgiska sjúkrarøkt
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og positiv/ur
- vil søkja mennandi avbjóðingar

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á G4, telefon 304500, lokal 5064 ella Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, e-postur ceci@lsh.fo

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 24. mai 2006 kl. 12.00.
Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.

**Skrivlig umsókn** í brævbjálva merktur "umsókn til starv" við CV, autorisatión, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Heilsurøktari/ pleygari til D2

Eitt fast starv á starvsbrøki 1,0 í blandaðum vaktum er leyst at søkja til setan 1. juni 2006.

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum.Vit raðfesta samstarvið og trivnaðin høgt, og at starvsfólkið er í støðugari menning og arbeiða áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið á deildini.

Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbókar, bæði innan- og uttanhýsis.

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum heilsurøktari/pleygari
- góð samstarvsevnir
- fakligan áhuga innan psykiatriska sjúkrarøkt
- Royndir innan psykiatriska sjúkrarøkt er ein fyrimunur, men tó einki krav

**Við kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og mennandi arbeiði
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakligu menningina
- góða innleiðslu

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálan millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2, tlf. 304500, lokal 4002, E-post: bian@lsh.fo ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, e-post bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 17. mai 2006 kl. 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn,** merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*




> Telefonráðgeving > Anonymitet
> Tagnarskyldu > Stundir at lurta

Bláí Krossur
www.blakross.fo

# TIL SØLU



***Silvurgráur***
***Hyundai Getz 1,3 árg. 2004 til sølu.***
***Eyka dekk á felgum fylgja við.***
***Koyrt 26.000 km.***
***TILBOÐ YNSKIST.***

***Tlf. 316123 - 268081***

# Útróðrarbátur til sølu

Hervið verður útróðrarbáturin M/B »Osla« lýstur til sølu við øllum rættindum og loyvum, 106 fiskidagar. Báturin liggur í Norðdepli.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 213029**